# við upsanum




*– Eg haldi, at vit sum heild hava góða rávøru í Føroyum. Fiskurin er vorðin javnari til dygdar, og tað er undantakið, at tú sært heilt vánaligan fisk longur, sigur Jógvan Høj, stjóri á Norðfra*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

food í Svøríki, men tað eru eisini aðrir keyparar.

Jógvan sigur, at rognatíðin er frá undan jólum og allan apríl mánaða. Flestu rognini hevur felagið keypt um Fiskamarknaðin Føroya.

– Nøgdirnar hava verið nógv minni í ár enn í fjør. Soleiðis er útboðið minkað, samstundis sum kappingin um rognini hevur verið harðari.

Hann sigur, at Norðfra keypti nógv upsarogn í fjør, men nú fleiri og fleiri skip hava fingið sær kryvjimaskinu, er nógv minni til av upsarognum, tí maskinurnar oyðileggja rognini undir kryvjing.

– Vit hava annars sukursaltað bæði toska-og upsarogn, leggur hann aftrat.

Jógvan sigur, at tey plaga at avskipa tunnurnar, tá ið tær fylla upp í eina bingju ella so.

– Ein partur av rávøruni, sum vit senda av landinum, kemur aftur higar til lands í tupum sum kaviarur, helst blandað við eitt sindur av olju.

## Nýggjur eginpeningur

Eigaraviðurskiftini hjá fiskavirkinum, Sp/f Norðfra í Norðdepli, eru broytt, soleiðis at Tavan í Leirvík nú eigur umleið 20% av partapeninginum, samstundis sum hjúnini, Esther og Allan Eysturskarð, eisini hava sett pening í felagið.

Meirilutaeigari og stjóri í felagnum er tó framvegis primus-motorurin, Jógvan Høj.

Á virkinum tekur dóttir Jógvan, Esther, sær mest av bókhaldinum og innkeypi av fiski, Allan Eysturskarð tekur sær av søluni á heimamarknaðinum, meðan Petur Simonsen í fyrsta lagi tekur sær av søluni uttanlands.

Nýggjur nevndarformaður í Sp/f Norðfra er Ingvar Joensen í Leirvík, sum er ein av drívhestunum aftanfyri gulllaksavirkið.



*– Tað er ikki altíð so lætt hjá skipum og bátum at siga ítøkiliga, hvat teir fara at hava inni, tá ið túrurin er liðugur – og ofta verður lastin seld, áðrenn túrur er lokin, sigur fiskakeyparin hjá Norðfra*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Tú fært ikki altíð tað tú betalir fyri

**Hendan dagin, Sosialurin vitjaði á Norðfra, høvdu tey keypt eina nøgd av fiski á Fiskamarknaði Føroya, men tá ið saman um kom, var nøgdin nógv minni, enn virkið hevði goldið fyri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Vit hava sent boð eftir arbeiðsfólkinum at møta í morgin, men nú noyðast vit at geva avboð til tey flestu. Fáa vit ikki fatur á teimum, kann hetta kosta virkinum pening.

Soleiðis greiddi Esther Eysturskarð, bókhaldari og fiskakeypari á Norðfra, frá, tá ið vit vitjaðu inni á virkinum ein seinnapart herfyri.

– Vit hava keypt og goldið fyri 14.000 pund av fiski til Fiskamarknaðin Føroya í dag, men nú vísir tað seg, at vit fáa bara 3.200 pund. Vit hava eisini goldið fyri leigu av kassunum, sum tey 14.000 pundini skuldu verða í, tá ið tey komu norður.

## Ov stórur munur

Esther spyr, hvat tey nú skulu gera?

– Við hesum 14.000 pundunum, skuldu vit havt 20.000 pund inni á gólvinum í morgin. Men nú hava vit bert 10.000 pund og hava sent boð eftir arbeiðsfólkinum.

Esther sigur, at tað ikki er óvanligt, at nøgdin, sum keypt er, ikki altíð er so neyv, men talan er sjáldan um meira enn 10% við síðuna av.

– Men í dag er munurin á tí, vit hava keypt og goldið fyri – og tí, vit fáa, stórur. Vit hava við øðrum orðum goldið fyri nakað, sum ikki er til.

Hon vísir á, at tað er ikki altíð so lætt hjá skipum og bátum at siga ítøkiliga, hvat teir fara at hava inni, tá ið túrurin er liðugur – og ofta verður lastin seld, áðrenn túrur er lokin.

– Men so langt við síðuna av er tað sjáldan, leggur hon aftrat.

Esther ljóðar eitt sindur irriterað, tá ið hon sigur, at svartiper, sum hon tekur til, aftur hesaferð kemur at liggja hjá framleiðaranum.

## Peningur til góðar

Vit spurdu hana, hvussu verður við ágóðanum hjá Fiskamarknaði Føroya í slíkum føri, tá ið meira verður goldið, enn veruliga nøgdin svarar til.

– Hetta verður avroknað soleiðis, at vit eiga pening til góðar hjá Fiskamarknaði Føroya, leggur Esther Eysturskarð, bókhaldari og fiskakeypari, aftrat.



*Esther Eysturskarð sigur, at tað er ikki óvanligt, at nøgdin, sum keypt verður um telefonina á Fiskamarknaði Føroya, ikki altíð er so neyv, men talan er sjáldan um meira enn 10% við síðuna av. – Í dag var munurin stórur, sigur hon*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*